ALMANNA – OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Tórshavn tann 5. juli 2007
J.Nr.: 0.21-200600583/14
Viðgjørt: RT

**Løgtingsmál nr. XX/2007: Uppskot til løgtingslóg um ókeypis koppseting móti ávísum sjúkum**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum**

**§ 1.** Henda lóg um ókeypis koppseting móti ávísum sjúkum er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 í ríkislóg nr. 316 frá 17. mai 1995 "om sundhedsvæsnet på Færøerne".

**§ 2.** Landsstýrismaðurin ásetur reglur um tilboð um ókeypis koppseting ímóti ávísum sjúkum, herundir um:

1. hvørjar sjúkur tilboðið um ókeypis koppseting fevnir um,
2. hvørjir persónsbólkar, ið fáa tilboðið um ókeypis koppseting, og
3. hvørjir læknar, ið skulu fremja koppseting sambært hesi lóg.

*Stk. 2.* Landskassin ber kostnaðin av koppseting sambært hesi lóg.

**§ 3.** Koppseting eftir hesi lóg verður framt sambært galdandi leiðreglum hjá heilsmyndugleikunum um koppsetingar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um fráboðanarskyldu um koppsetingar eftir hesi lóg.

**§ 4.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi "Kongelig anordning nr. 17 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om tilbud om gratis vaccinationer mod visse sygdomme, som ændret ved kongelig anordning nr. 845 af 18. december 1987".

**§ 5.** Kunngerðir, sum eru settar í gildi sambært "Kongelig anordning nr. 17 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om tilbud om gratis vaccinationer mod visse sygdomme, som ændret ved kongelig anordning nr. 845 af 18. december 1987", verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi ella verða avloystar av reglum, givnum við heimild í hesi lóg.

---

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Endamálið við hesi lóg er at gera eina føroyska lóggávu á koppsetingar-økinum, so henda verður í tráð við sonevndu rammulógina á heilsuøkinum. Sambært rammulógini á heilsuøkinum (lov nr. 316 af 17. maj 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne) er heimilað føroysku myndugleikunum

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: ahr@ahr.fo

at fremja lóggávu á heilsuøkinum. Tá rammulógin varð sett í gildi varð samstundis avrátt, at danska lóggávan á økinum framhaldandi var galdandi, til nýggjar løgtingslógir loysa hesar av. Í sambandi við, at landsstýrismaðurin hevur avgjørt at verkseta eina skipan við ókeypis koppseting móti influensa til øll eldri yvir 66 ár hevur hildið vera rættast, at tann gamla danska lógin um ókeypis koppsetingar samstundis verður avloyst av føroyskari lóggávu.

Landsfelag Pensjónista hevur fleiri ferðir sett ynski fram um at fáa eina skipan við ókeypis koppseting ímóti influensa til øll fólk ið eru 67 ár og eldri setta í gildi í Føroyum. Somuleiðis hevur Landslæknin mælt til, at ein slík skipan verður sett í verk í Føroyum, eins og tær eru í øllum grannalondum okkara. Á hesum grundarlagi hevur landssstýrismaðurin avgjørt at ein slík skipan eisini skal vera sett í gildi í Føroyum, so hon kann virka á heysti 2007. Politisk undirtøka er í samgonguni fyri hesi ætlan, og peningur til skipanina stóð á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2007 (kr. 800.000,-), men var tikin av aftur undir nevndarviðgerðini orsakað av, at materiella heimildin tá ikki varð greið.

Hetta lógaruppskotið er nærum einsljóðandi við galdandi ríkislóg. Tað merkir m.a., at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetur, hvørjar sjúkur tilboðið um ókeypis koppseting fevnir um. Orsøkin til henda leistin er, at møguligt skal vera at bera skjótt at, um ókeypis koppseting av umfarssjúkum knappliga gerst neyðug. Galdandi skipan fevnir um hesar sjúkur: Kikhosti, difteritis (smittandi svølgrúmssjúka), stívkrampi, barnalammilsi (polio), meslingar, reydlingar, fárasjúka og Hæmophilus influenzae, type b (Hib) (ein bakteria, ið m.a. kann elva til meningithis). Harumframt hevur landslæknin á sumri 2007 mælt til, at barnakoppsetingarskráin verður víkað við eini pneumkokkoppseting (pneumkokkar er ein bakteria, ið eins og Hib m.a. kann elva til meningithis). Landsstýrismaðurin tekur undir við hesum tilmæli, og málið verður viðgjørt sum partur av arbeiðnum við uppskotinum til fíggjarlóg fyri fíggjarárið 2008.

Í galdandi ríkislóg er ásett, at "Sundhedsstyrelsen" ger leiðreglur fyri fremjing av koppsetingum og eisini hevur heimild til at áseta reglur um fráboðanarskyldu um koppsetingar eftir lógini. Hóast føroyskir myndugleikar sambært rammulógini á heilsuøkinum hava heimild til at fremja lóggávu um koppsetingar, fevnir henda heimild ikki um at áleggja danska stovninum "Sundhedsstyrelsen" nakrar skyldur. Tí er § 3 í lógaruppskotinum soleiðis orðað, at koppsetingin verður framt sambært galdandi leiðreglum hjá heilsumyndugleikunum, sum í hesum føri er danska "Sundhedsstyrelsen". Somuleiðis verður ásett í § 3, stk. 2, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um fráboðanarskyldu av koppsetingum sambært hesi lóg. Sambært galdandi ríkislóg hevur "Sundhedsstyrelsen" hesa heimild, men ein slík fráboðanarskylda er ongantíð sett í verk. Tó verður hildið vera rættast, at varðveita heimildina í føroysku lóggávuni um ókeypis koppsetingar, tí hetta kann m.a. fáa týdning í sambandi við skrásetingar í tí komandi talgildu heilsuskipanini.

Sambært galdandi kunngerð um koppsetingar, hevur "Statens Serumsinstitut" skyldu til at hava koppsetingarevni á goymslu, til koppseting móti teim sjúkum sum verða nevndar í kunngerðini (sí omanfyri í almennu viðmerkingunum). Ætlanin er, at Apoteksverkið skal yvirtaka hesa skyldu, til at hava koppsetingarevnini á goymslu. Hetta er ein uppgáva sum apoteksverkið longu í stóran mun røkir í dag, sambært avtalu við "Statens Serumsinstitut".

Ætlanin er, at føroysku kommunulæknarnir framhaldandi skulu fremja koppsetingar eftir hesi lóggávu. Hetta merkir, at kommunulæknarnir eisini fáa til uppgávu at koppseta eldri fólk ímóti influensa, tá henda skipanin verður sett í verk. Samsýningin til kommunulæknarnar fyri koppseting av eldri fólki móti influensa verður ásett á sama støði sum í Danmark. Hetta verður gjørt í eini avtalu millum Almanna- og heilsumálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya.

Lógaruppskotið hevur í sær sjálvum ikki nakrar broytingar við sær. Men verður tilhoyrandi kunngerðin soleiðis broytt, at heimild verður fyri ókeypis koppseting móti influensa til øll eldri yvir 66 ár, hevur hetta bæði meirumsiting og meirkostnað við sær. Neyðugt verður nevniliga at gera eina tekniska tillaging av barnakoppsetingarskrásetingini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum soleiðis, at møguligt eisini verður at avgreiða koppsetingarnar til eldri. Í hesum sambandi verður neyðugt at skráseta umleið 5.600 persónar í skipanina, eins og gjaldið til kommunulæknan fyri at hava framt koppsetingina skal avgreiðast. Skrásetingin av teim eldri í skipanini skal bert gerast einaferð, meðan avgreiðslan av gjaldinum skal fremjast einaferð um árið.

Kostnaðurin av ókeypis koppseting móti influensa til øll eldri yvir 66 ár er ikki heilt greiður enn. Hesin er partvís tengdur saman við tann innkeypsprís, sum apoteksverkið skal rinda fyri koppsetingarevnini, og partvís at tí samsýning, sum kommunulæknarnir skulu hava fyri at fremja koppsetingarnar. Hesi viðurskifti verða væntandi greið seinni í summar. Ein fyribils meting sigur tó, at skipanin kemur at kosta landskassanum umleið 1,3 mió. kr. Tá er meirumsitingin í Almanna- og heilsumálaráðnum íroknað. Ætlanin er at seta skipanina í verk í heyst. Neyðugt verður tí at søkja um eykajáttan, og tá verður ein greinað kostnaðarmeting løgd fyri Løgtingið.

**Ummæli**

Uppskotið verður sent til ummælis hjá hesum hoyringspørtum:
Kommunulæknafelag Føroya
Landsapotekarin
Landslæknin
Føroya Kommunufelag
Kommunusamskipan Føroya
Landsfelag Pensjónista
Ríkisumboðið

**Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur við sær óbeinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Hesar standast av ætlanini um at broyta tilhoyrandi kunngerðina til lógina soleiðis, at sett verður í gildi ein skipan við ókeypis koppseting ímóti influensa til øll fólk í Føroyum, ið eru 67 ár og eldri. Ein fyribils meting sigur, at skipanin kemur at kosta landskassanum umleið 1,3 mió. kr. Tá er meirumsitingin í Almanna- og heilsumálaráðnum íroknað. Orsøkin til, at fíggjarligu avleiðingarnar eru óbeinleiðis er, at møguligar broytingar verða gjørdar í tilhoyrandi kunngerðini, og ikki sum partur av lógini.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur við sær óbeinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Neyðugt er at gera eina tekniska tillaging av barnakoppsetingarskrásetingini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, so koppsetingarnar av eldri fólki eisini kunnu avgreiðast av skipanini. Umleið 5.600 persónar skulu upprættast í skipanini, eins og gjaldið til kommunulæknan fyri at hava framt koppsetingina skal avgreiðast. Skrásetingin av teim eldri í skipanini skal bert gerast einaferð, meðan avgreiðslan av gjaldinum skal fremjast einaferð um árið.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Sosialar avleiðingar**
Lógaruppskotið hevur ávísar óbeinleiðis positivar sosialar avleiðingar. Tá skipanin við ókeypis koppseting ímóti influensa til øll fólk í Føroyum, ið eru 67 ár og eldri er komin í gildi, fáa eldri fólk betri møguleikar at verja seg ímóti krími. Hetta eigur aftur at elva til eina minking í sjúkutilburðunum, og harvið eisini minka um trýstið á familjuna hjá eldri og veikum fólki.
Orsøkin til, at fíggjarligu avleiðingarnar eru óbeinleiðis er, at møguligar broytingar verða gjørdar í tilhoyrandi kunngerðini, og ikki sum partur av lógini.

**Millumtjóða sáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar.

**Skyldur álagdar einstaklingum**
Lógaruppskotið áleggur ikki einstaklingum nakrar skyldur.

**Heimildir til annan landsstýrismann ella kommunur**
Lógaruppskotið gevur hvørji kommunum ela øðrum landsstýrismonnum nakrar heimildir.

**Talva – Avleiðingar**

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | (Ja) | Nei | Nei | (Ja) | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | (Ja) | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | (Ja) | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1.** Sambært Indenrigs- og Sundhedsministeriet er føroyskum myndugleikum heimilað at fremja lóggávu um ókeypis koppsetingar móti smittandi sjúkum. Henda grein vísir til ítøkiligu heimildina, sum er at finna í ásetingunum um kommunulæknaskipanina í sammulógini á heilsuøkinum.

**Til § 2.** Greinin heimiðlar landsstýrismanninum í kunngerð at áseta, hvørjar sjúkur tilboðið um ókeypis koppseting fevnir um, hvørjir persónbólkar ið kunnu fáa hetta tilboð og hvørjir læknar ið kunnu fremja koppsetingar sambært hesi lóg. Orsøkin til uppskotið um, at landsstýrismaðurn fær heimild til at gera hesar ásetingar er, at møguligt skal vera at bera skjótt at, um ókeypis koppseting av umfarssjúkum knappliga gerst neyðug.

Kunngerðin verður orðað á sama hátt sum galdandi kunngerð við undantaki av, at heimild eisini verður fyri at bjóða øllum eldri yvir 66 ár ókeypis koppseting móti influensa. Aldursmarkið er ásett so hetta svarar til fólkapensjónsaldur.

**Til § 3.** Ásett verður, at allar koppsetingar eftir hesi lóg skulu fylgja galdandi leiðreglum hjá heilsumyndugleikunum. Sambært verandi skipan av føroyska heilsuverkinum, er hesin myndugleiki danska Sundhedsstyrelsen. Landslæknin hevur sostatt til uppgávu at kunna um slíkar leiðreglur.

Heimildin hjá landsstýrismanninum um at áseta reglur um fráboðanarskyldu um koppsetingar hevur til endamáls at tryggja, at koppsetingarnar eftir lógini verða skrásettar í Talgildu Heilsuskipanini (THS), tá henda er tikin í nýtslu. Harvið slepst undan, at børn og eldri verða koppsett oftari enn koppsetingarskráin sigur (tvs. at dupult koppseting ikki kann koma fyri).

**Til § 4.** Gildiskomuregla. Heimildin til at seta eina ríkislóg úr gildi stavar í hesum føri frá somu heimild ið liggur til grund fyri hesum lógaruppskoti, nevniliga § 1, stk. 2, nr. 2 í lov nr. 316 frá 17. mai 1995 om sundhedsvæsnet på Færøerne.

**Til § 5.** Sum skiftisregla er ásett, at galdandi kunngerð um ókeypis koppsetingar (bekendtgørelse nr. 634 af 5. juli 1994 om gratis vaccination mod visse smitsomme sygdomme m.v. på Færøerne) verður galdandi til hon verður avloyst av eini nýggjari kunngerð. Orsøkin til hetta er, at Almanna- og heilsumálaráðið enn ikki er til reiðar til, formliga at seta fyriskipanina við ókeypis koppseting móti influensa í verk. Tá allar avtalur eru greiðar, og fíggjarlig heimild er veitt gjøgnum eykajáttanarlóg, verður danska kunngerðin avloyst av eini einsljóðandi føroyskari kunngerð, sum eisini heimiðlar at bjóða øllum eldri yvir 66 ár ókeypis koppseting móti influensa.

**Hjáløgd skjøl:**

**Skjal 1:**
Skriv til Almanna- og heilsumálaráðið frá Indenrigs- og Sundhedsministeriet har sagt verður frá, at sambært rammulógini á heilsuøkinum hevur Føroya Løgting heimild til at fremja lóggávu um ókeypis koppsetingar móti smittandi sjúkum.

Almanna- og heilsumálaráðið, xx. xxx 2007

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður